## Serbia fær lán frá IMF



Altjóða Gjaldoyragrunnurin er til reiðar at læna Serbia pengar til at avmarka avleiðingarnar av fíggjarkreppuni við. Altjóða Gjaldoyragrunnurin, IMF, hevur boðað serbisku stjórnini frá, at hon kann fáa tríggjar milliardir krónur í láni til at avmarka avleiðingarnar av altjóða fíggjarkreppuni við. IMF-stjórin, Dominique Strauss-Kahn, sigur, at talan er um eina tilsøgn, men at Serbia fær ikki pengarnar, uttan at tørvur er á teimum. IMF-stjórin hevur biðið G20-londini um meiri pengar til grunnin, tí annars verður hann ikki førur fyri at nøkta eftirspurningin eftir lánum, sigur hann.

## Framvegis arbeiði á Norðís

Í Vikuskiftis Sosialinum stóð, at Norðís á Eiði fór at lata aftur mánadagin. Hetta vísti seg ikki at vera heilt soleiðis, tí virkið fekk fisk í gjáramorgunin, tá línuskipið, Grani, landaði. Hetta gjørdi, at virkið verður í drift í tveir til tríggjar dagar afturat, sambært Jóhan Páll Joensen. – Tey arbeiða vanligar dagar sum er, men eg veit ikki heilt, hvussu leingi tað verður, sigur stjórin í Maru Seafood. Jóhan Páll Joensen leggur afturat, at við arbeiðinum at bjarga Maru, dugir hann ikki at síggja heilt hvønn veg tað ber, men at hann framvegis arbeiðir við fleiri møguleikum.

# Fingrarnar burtur frá Smyrli

**Nú Norrøna er givin at sigla til Skotlands, skulu tit ikki vága tykkum at taka Smyril frá suðuroyingum til skotlandssigling, gjørdu javnaðarfólk í Suðuroy púra greitt á landsfundinum hjá flokkinum um vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Javnaðarflokkurin skal ikki vága sær at taka Smyril úr suðuroyarsiglingini og seta hann í skotlandssigling.

Tað gjørdi Pauli Einarsson, floksfeløgum sínum púra greitt á landsfundinum hjá flokkinum um vikuskiftið.

Hann vísti á, at summi Javnaðarflokk hava harmast um, at skotlandssiglingin hjá Norrønu nú verður niðurløgd.

Og hann viðgekk, at hetta gjørdi hann eitt sindur nervøsan, tí tað var eitt annað skip í Føroyum, sum kann brúkast til Skotlandssigling.

Í hesum sambandi sipaði hann til Smyril.

Men bara soleiðis frammanundan gjørdi hann flokkinum púra greitt, at tey skuldi ikki fáa nøkur sum helst hugskot, sum bóru á tann bógvin.

- Eitt veit eg, tit skulu ikki røra Smyril. Vissi tit so mikið sum nevna orðini "Smyril" og "Skotland" í sama setningi, skulu tit ikki vænta nakran stuðul frá okkum á næsta valið, gjørdi Pauli Einarsson púra greitt.

### Ongar ætlanir

John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, staðfestir, at ongar politiskar ætlanir hava verið um at taka Smyril til uttanlandssigling.

Dánjal Andreasen, stjóri á Strandferðsluni, hevur heldur ikki hoyrt um slíkar ætlanir.

Hann sigur, at sum Smyril er nú, er tað ivingarsamt, hvussu hóskiligur hann er til uttanlandssigling, tí hann hevur bara 96 koyggjur og sostatt kann hann ikki føra meiri enn 96 ferðafólk.

Eftir altjóða reglum, er onki, sum eitur dekkspláss longur, tí nú er tað eitt krav, at hvørt ferðafólk hevur sína koyggju.

Skal Smyril føra nakað av ferðafólki, sum munar í uttanlandssigling, verður sostatt fyrst neyðugt at gera fleiri koyggjur umborð.

Annars hevur fleiri ferðir áður verið umrøtt at lata Smyril sigla ein túr úr Suðuroy til Scrabster fríggjakvøld, so at hann kann vera aftur í Suðuroy sunnudag. Sostatt skal annað skip fáast til siglingina ímillum Suðuroy og Havnina leygardag og fyrrapartin sunnudag.



*Javnaðarflokkurin skal ikki so mikið sum vága sær at nevna orðini "Smyril" og "Skotland" í sama setningi, gjørdi Pauli Einarsson, formaður í Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag, floksfeløgum sínum púra greitt á landsfundi í flokkinum um vikuskiftið. Her situr hann á landsfundinum vinstrumegin, undir liðini á konuni, Inu og Jacob Ludvig úr Hvalba*

# Gerhard Lognberg aftur í hitanum

**Gerhard Lognberg og floksfelagir hansara hava so hjartaliga grivið stríðsøksina eftir eitt ógvuliga rokaligt vár og summar**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*



*Gerhard Lognberg følir seg aftur væl ímillum sínar egnu ogá landsfundinum um vikuskiftið staðfesti hann, at allar ósemjur eru lagdar aftur um. Her er hann á landsfundi, høgrumegin, undir liðini á Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í heilsumálum*

Gerhard Lognberg situr aftur fjálgt og væl í Javnaðarflokkinum.

Tað kann staðfestast eftir landsfundin hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið.

Sostatt hava Gerhard Lognberg øðrumegin og restin av javnaðarflokkinum hinumegin, grivið stríðsøksina langt niður, eftir eitt eljustríð í alt vár og út á summarið, sum var so rokaligt, at tað hótti við at spøna Javnaðarflokkin.

Tað var spurningurin um undirsjóvartunnil í Sandoy, har Gerhard Lognberg var so ósamdur við restina av Javnaðarflokkinum, at hann enntá varð hóttur við at verða tveittur úr flokkinum.

Hinvegin vóru tað eisini onnur javnaðarfólk, ikki minst javnaðarfólk á bygd, sum sóu sandoyartingmannin sum ein hetju, ið tordi at seta seg upp ímóti yvirvøldini – og sum tordi at standa rimmarfast, hóast tað breyt harðliga í bæði borð.

### Skuldi vigast á fundi

Serliga gjørdust tað ovboðið hjá nógvum javnaðarfólki eftir ein rokmiklan tingfund, har Gerhard Lognberg av sjálvum tingsins røðarapalli, kallaði sín egna floksformann, Jóannes Eidesgaard, sum enntá eisini var løgmaður, fyri svíkjara.

Eitt skifti var so ísakalt ímillum sandoyartingmannin og restina av Javnaðarflokkinum, at eitt skifti varð hann ikki boðin við á fund hjá tingmanningini og hann duldi ikki fyri, at hann føldi seg ikki sørt frystan úti úr sínum egna flokki.

Tað endaði við, at boðað varð frá, at Javnaðarflokkurin fór at kalla saman til eyka landsfund at viðgera støðuna hjá Gerhardi Lognberg og um hann skuldi tveitast út.

Men tann fundurin bleiv ongantíð.

Síðani varð sagt, at málið